# í Ishøj



*Manningin á Tvøroyrabátinum vísti, hvussu nøgdir teir vóru við, at teir megnaðu at vinna á Havnarbátinum, ið hevur vunnið 7 ár á rað.*



*Manningin á Gongurálvi fegnaðist óført um sigurin*



*Livandi tónleikur var í teltinum seinnapartin, og hetta dámdi fólki so væl, at sera nógv vóru verandi allan dagin*



*Spik og annað gott smakkaði væl hjá føroysku útiseta gómunum*



*Heine Davidsen var sum altíð ein sera livandi frásøgumaður bæði til kappróðurin og togtoganina*



*Fyri tey yngstu var undirhald við Angelu og Hannibal og andlitsmáling. Nógv børn nýttu høvið at verða málaði í andlitinum*



*Millum gestirnar vóru løgmaður Jóannes Eidesgaard, ið helt setanarrøðuna og nýggi føroyski sendimaðurin í Keypmannahavn Herálvur Joensen*



*Take Off spældi til dansin, og góði dansitónleikurin fall í góða jørð hjá teimum 200, ið vóru komin í dansin*